# Náttin tá synagog

Reportasja



Vivian Begerau



*Eftir hesa vanlukku novembernátt vistu fólk í øllum førum, at synagogurnar vóru oyðilagdar, eins og jødiskir kirkjugarðar vóru vanhalgaðir, og at eksistensgrundarlagið var tikið undan jødunum. Jødisk siðvenja, mentan og átrúnaður, ið hevði verið til í Týsklandi í fleiri hundrað ár, vóru nú horvin*

Tann 09.11. í ár vó ru 70 ár liðin síðani sokallaðu „Ríkiskrystallnáttina". Hesa nátt stóð helmingurin av synagogunum í Týsklandi og Eysturríki í ljósum loga og túsundavís av handlum hjá jødum vórðu oyðilagdir. „Ríkiskrystallnáttin" var byrjannin til endan fyri jødarnar í hersetta partinum av Evropa. Undir minningarhaldi í Berlin tosaði Bundeskanslarin Angela Merkel um stóra týdningin av ikki at tiga, tá rasisma, fremmandahatur og antisemitisma koma til sjóndar í dag.

Fleiri týðandi hendingar í yngstu søgu Týsklands fóru fram 9. november. Múrurin fall tann 9. november í 1989, Hitler royndi eisini at koma til valdið tann 09.11.1923. Eisini Ríkiskrystallnáttin, ið hoyrir til myrka partin av søgu Týsklands í 20. øld, var 9. november 1938.

## Mismunirnir ímóti jødunum

Jødarnir í Týsklandi vóru stigvíst fyri mismuni í 1930-unum. Eittnú var teimum ikki loyvt at vera í almennum størvum síðani valið í 1933. Vegna sokallaða „jødaboykottið" í apríl 1933 var torført at útinna sjálvstøðugt arbeiði, eittnú læknar, løgfrøðingar og dómarar høvdu ikki møguleika fyri at útinna sítt starv. Harvið var grundarlagið tikið undan nógvum virksemi, nógvar fyritøkur vórðu tí seldar fyri spottprís. „Keyp ikki frá jødum" stóð skrivað á skeltum uttan fyri handlar hjá jødum.

Henda støða hevði við sær, at jødarnir blivu ein útjaðarabólkur. Túsundtals jødar sóu tí ikki annan útveg enn at rýma av landinum. Tá Nürnberglógirnar komu í 1935, var støðan uppaftur spentari. Hesar lógir kravdu strangan skilnað ímillum rasurnar. Harvið var antisemitiska hugmyndin løgfrøðiliga grundað. Frá 1937 gekk jødaforfylgingin skjótari fyri seg. SS-førarin Heinrich Himmler kravdi alment at „avjødisera" Týskland. Hetta krav var longu orðað í floksskránni hjá NSDAP (Hitlerflokkinum) í 1920. Tó gingu nógv ár, áðrenn hetta varð sagt beinleiðis við almenningin. Vegna hesi torføru kor flýddu útivið ein tíggindapartur at jødunum úr Týsklandi. Samlaða talið av jødum í Týskland og Eysturríki var langt oman fyri ein hálva millión undan 2. heimsbardaga.

## Propagandamaskinan

At illa gitna propagandamaskinan eisini var virkin áðrenn krígsbyrjan er hendingin undan ríkiskrystallnáttina eitt gott dømi um. Tann 07.11.1938 kom ein jødiskur lesandi inn á týsku sendistovuna í París og skeyt týska umboðsmannin Ernst vom Rath. Hendingin var júst tað, ið nýtast skuldi fyri at rættvísgera atsóknina ímóti jødunum. Almenningurin hoyrdi um hendingina í París tann 08.11, men fyrstu atsóknirnar ímóti jødunum byrjaðu longu á kvøldi tann 07.11.1938. Spurningurin er, hvussu ein tílík einahending kundi rættvísgera ríkiskrystallnáttina. Politiska leiðslan vildi via propaganda hetsa fólkið ímóti jødunum. Lygisøgur vórðu íspunnar um eina jødiska (heims)samansvørjing. Teir fingu skuldina av at hava uppfunnið bæði kapitalismuna eins og „bolsjevikismuna", ella kommunismuna. Harvið vórðu jødarnir lýstir sum rótin til alt ónt. Tá tíðindini komu um jødiska drápsmannin í París, ið hevði tikið lívið av ókenda umboðsmanninum, fóru sinnini upp at kóka og klárt var at fremja lagnutungu atsóknirnar ímóti jødunum tann 09.11.1938.

## Ríkiskrystallnáttin

Longu tann 08.11.1938 stóð fyrsta synagogan í „Bad Hersfeld" í ljósum loga og manga aðrastani vórðu atsóknir framdar ímóti jødum. Atsóknirnar byrjaðu av álvara um kvøldið tann 09.11.1938. Hesa nátt vísti antisemitisman sítt sanna andlit í Týsklandi. Limir í NSDAP og offensivi bólkurin SA (Sturmabteilung) undir NSDAP eins og ungdómar ið vóru partur av „Hitlerjugend", fóru út hesa nátt fyri at oyðileggja og seta eld á. Hesi vóru í vanligum klæðum, so ikki var sjónligt, at tað var politiskt virkni. Umleið 7500 handlar vórðu heilt oyðilagdir hesa nátt. Harumframt høvdu nasistarnir megnað at fingið øði í nógv fólk, so tá handilsvindeygu vórðu brotin, komu nógv privatfólk upp í leikin og rændu. Bæði løgreglan og sløkkiliðið høvdu fingið boð um at lata standa til. Sløkkiliðið skuldi bert hjálpa, um týsk ogn var í vanda av eldinum. Helvtin av synagogunum í Týsklandi og Eysturríki vórðu brendar í grund hesa nátt. Talið var umleið 1400. Almannakunngjørda talið av deyðum var 91, men telur man øll við, ið antin doyðu av hjartaslag ella tóku lívið av sar sjálvum, ella vóru pínd til deyðis í konsentratiónslegunum hesar dagar í 1938 er talið einastaðni ímillum 1300 og 1500. Eftir „ríkiskrystallnáttina" fóru SS og Gestapo í holt við at tvingsilsflyta jødar, serliga múgvandi jødar, til konsentrationslegur í „Buchenwald", „Sachsenhausen" og „Dachau". Treytin fyri leyslating úr konsentratiónslegunum var lyfti um at fara av landinum innan stutta tíð. Hóast Goebbels bað allmenningin um at steðga atsóknunum, vardu tær heilt fram til 13.11.1938.

Vegna alt tað brotna glasið hesa nátt, fekk atsóknin harm-